

Suni á Dalbø, oljuráðgevi hjá Suður-Vestur Samtakinum, er sannførdur um, at lyklaorðið hjá føroyingum í sambandi við eina komandi oljuvinnu er samstarv

## Oljuráðgevi:

# Samstarv er lyklaorðið

Suni á Dalbø heldur tað hava stóran týdning fyri føroyingar, at vit sum ein eind venda okkum mótvegis nýggju vinnuni, sum pengasterk oljufeløg stýra. Hann er ímóti at syndra og miðsavna samfelagið, áðrenn vit yvirhøvur vita, um nøkur olja er í undirgrundini. Tískil hevur hann gjørt eitt uppskot, har størstu havnirnar í Føroyum samstarva undir heitinum »Faroe Islands Harbour Trust«.

DIA MIDJORD

Suni á Dalbø, oljuráðgevi hjá Suður-Vestur Samtakinum, ávarar harðliga ímóti, at oljuvinnan fer at syndra samfelagið eftir fáum árum, um ikki allir føroyingar samstarva. Í hesum sambandi fer hann næstu vikurnar at brúka orkuna til at gera eina verkætlan, sum byggir á eitt samstarv millum størstu havnirnar í Føroyum. Talan er í fyrstu syftu um Havnina, Klaksvíkina, Tvøroyri, Vág, Vágoynna, Skálafjørðin og Vestmanna.

### Felags samtak

Suni á Dalbø hevur verið í práti við ymsar partar av altóða oljuvinnuni og er komin til, at eitt samstarv krevst, um vit skulu hava stýr á risastóru avbjóðingini, sum stendur føroyingum fyri framman. Og útlendsku oljufeløgini vilja hava ein samstarvspartnara, sum teir við vissu kunnu hava álit á.

– Samtakið Føroyskar Ídnaðarhavnir skal gera avtalur og samskipa allar inntøkur, ið hava við oljuvinnuna at gera. Hesar inntøkur koma ikki at nerva vanligu inntøkurnar hjá havnunum, sum sostatt framhaldandi kunnu hava sítt dagliga virksemi, sigur Suni á Dalbø.

Oljuráðgevin leggur dent á, at hann næstu vikurnar fer at arbeiða við eini verkætlan, um áhugið er frá teimum ymsu pørtunum.

– Er áhugin til staðar, so verður eitt fullfíggjað uppskot gjørt, sum partarnir skulu góðkenna ella vraka á sumri 1998.

Suni á Dalbø sigur víðari, at tað hevur stóran týdning, at vit føroyingar eru til reiðar og lofta oljuvinnuni, tá hon av røttum kemur.

– Kunnu vit ikki fáa eitt samstarv at virka, áðrenn oljuvinnan kemur av álvara, so vit í Føroyum alla tíðina stýra gongdini, so fer ikki at bera til seinni. Tá ið oljufeløgini fara at lukta blóð, so hava vit einki at siga í Føroyum. Oljufeløgini taka allar avgerðir um útgerðarhavnir, goymslur og annað. Og menniskja er nú einaferð innrættað soleiðis, at tey, sum fáa ágóðan, neyvan í fyrstu atløgu hugsa um samstarv við onnur øki, sigur Suni á Dalbø.

### Ikki leypa framav

Oljuráðgevin heldur tað hava stóran týdning, at havnirnar í Føroyum samstarva, so ikki onkur byggir seg um koll ella ger óneyðugar íløgur, sum kanska ongantíð verða brúktar, tí ongin olja var í undirgrundini. Á henda hátt oyðileggja vit samfelagið.

– Samtakið Føroyskar Ídnaðarhavnir verður stýrt av eini nevnd, sum kommunurnar velja. Eitt slíkt samtak frátekur einkarættin, men gevur ístaðin øllum ein part av ágóðanum, sigur oljuráðgevin og leggur aftrat:

– Samtakið Føroyskar Havnir hevur alla tíðina fingurin á pulsinum. Verður talan um framleiðslu av olju, so verður peningur at arbeiða við hjá samtakinum. Verður eingin olja funnin í leitingarumfarinum, so eru eingir pengar til samtakið og alt steðgar upp av sær sjálvum.

# Kappingin verður avlagað við stuðuli frá tí almenna

– Vit hava fleiri dømir um, at MBM selir maskinur fyri minni enn innkeypsprís og hetta kann als ikki verða rætt, tá sama fyritøka er stuðlað við almennum pengum, sigur stjórin í Triv, Óli Mortensen, sum í mong ár hevur liva av at selt maskinur til landbúnaðin.

ELI GUTTESEN

– Tað sum er hent nú er, at MBM, sum í stóran mun fær bílig lán frá jarðarráðnum og studning frá tí almenna, hevur fingið innivist á búnaðardeplinum í Kollafirði og roynir at útkonkurrera okkum, sigur Óli Mortensen frá Triv.

– Her er als ikki talan um kapping á jøvnum føti. Vit hava í áravís liva av at selt sláimaskinur og aðrar landbúnaðarmaskinur, men nú roynir MBM at taka alt frá okkum. Eftir at hava fingið innvist í Búnaðardeplinum í Kollafirði, sum tað almenna læt gera fyri slakar 80 mió. kr., sigur hann.

– MBM selur bæði mjólkaúrdráttir, fóður og landbúnaðarmaskinur hvørt um annað. Samstundis hava teir eisini ein verkstað fyri bilar og landbúnaðarmaskinur. Ringt er at siggja hvat hvør søla gevur av sær, tí alt verður samanvavt í roknskapinum. Samstundis letur landskassin munandi studning til mjólkarframleiðslu og ein partur av hesum studningi verður óbeinleiðis brúktur til at útkonkurrera privata vinnulívið, sum ikki er móttakari av studningi, sigur Óli Mortensen frá Triv.

### Gongdin

– Í longri tíð hildu vit okkum til ein millumhandlara í Danmark, sum vit keyptu maskinur frá. Men fyri tveimum árum síðan skiftu vit frá Danska millumhandlaranum og fóru at keypa beinleiðis frá verksmiðjuni í Italia. Væl gekst fyrstu tíðina tí hetta spardi okkum fyri eyka millumhandlaraútreiðslur og vit kundu hava kappingarførar prísir, sigur Óli.

– Men hetta dámdi danska millumhandlaranum lítið. Vit vístu honum eitt rundskriv, sum landsstýrið gjørdi í samband við, at handilsmál vórðu yvirtikin sum føroyskt sermál. Sambært hesum skrivi skal føroyski innflytarin so vítt møguligt royna at hava so fáar millumhandlarir sum møguligt, fyri at føroyski brúkarin skal fáa influttu vøruna so bíliga sum tilber. Føroyar er sambært hesum rundskrivi, ein serstøk tjóð eins og aðrar tjóðir, tá tað snýr seg um handil, sigur Óli Mortensen.

### Útifrystir

– Men tá vit fyrr í ár venda okkum til danska torhandlarin fyri at fáa fatur á einum eykaluti til eina maskinu, varð hetta noktað okkum, við teirri grundgeving, at MBM hevði yvirtikið umboðið í Føroyum.

– Vit vóru tí noyddir at venda okkum aðrar vegir fyri at fáa fatur í eykalutinum. Sostatt keyptu vit bæði maskinur og eykalutir beinleiðis úr framleiðslulandinum, hóast bíðitíðin til eykalutir gjørdist eitt sindur longri enn frammanundan.

– Í síðstu viku hendi so tað, at ein av teimum maskinunum, sum vit hava fingið úr Italia hava vit kallað í klombrum fyri Nibbi, hóast hetta ikki er av merkinum Nibbi. Hetta er ein sokallað Golf 12 maskina, men sera lík Nibbi maskinuni. Vit fingu boð frá framleiðaranum í Italia, um at vit ikki máttu nýta Nibbi navnið ella selja maskinuna undir tí merkinum.

– Orsøkin til at vit fingu hesi boðini úr Italia var, at italska verksmiðjan hevði fingið boð frá italska umboðnum, sum hevði fingið boð frá danska umboðnum, sum hevði fingið boð frá MBM í Føroyum, at hatta kundu teir ikki finna seg í.

– Vit halda tað vera gott gjørt, at MBM tekur upp samstarv við danska umboðið, tá hetta virkar sum dýrkandi millumlið, í stríð við rundskrivið frá løgmanni. Serliga skeivt tikist hetta vera tá sølan nærum burturav er til landbúnaðin, sum í stóran mun er bundin av studningi frá tí almenna, sigur Óli Mortensen frá Triv.



**MBM, roynir við almennum studningi og í stríð við rundskrivi hjá løgmanni at spenna bein fyri okkara sølu av landbúnaðarmaskinum, sigur Óli Mortensen frá Triv**

Mynd: Kalmar Lindenskov

# Hanstholm og Hetland á komandi ferðaætlan

Smyril Line hevur kunngjørt summarferðaætlanina hjá Norrönu fyri komandi ár. Byrjað verður 30. mai og summarsiglingin endar í Hanstholm 3. september.



Norröna fer komandi summar aftur at sigla til Hanstholm og Lerwick

Aftan á summarið 1992 kunngjørdi Smyril Line, at nú var liðugt á hesum sinni við Hanstholm, tí ferðamannaskipið Norröna í framtíðini skuldi sigla til Esbjerg. Og nú Esbjerg hevur fingið ágóðan av Norrönu í fimm ár, er túrurin komin aftur til Hanstholm.

Og Smyril Line hevur eisini fingið eyguni upp fyri tørvinum, ið føroyingar hava at sleppa sjóvegis til bretska meginlandið. Í samráð við landsstýrið hevur Smyril Line avgjørt, at Hetland frá komandi summar aftur skal í ferðaætlanina. Tað er lagað manni at sleppa úr Hetlandi við ferju ella flogfari til Skotlands.

30. mai leggur Norröna frá bryggju úr Hanstholm og setir kós móti Føroyum. Siglingarmynstrið verður Hanstholm, Tórshavn, Lerwick, Bergen, Lerwick, Tórshavn, Seyðisfjørður, Tórshavn og Hanstholm. Summarsiglingin hjá Norrönu 1998 endar í Hanstholm 3. september.

